# Krossvegir á

**– Ætlanin við hesi verkætlanini er at skilja tað mentanarstríðið, sum fer fram í Føroyum, og sum § 266b var eitt tekin um. Tað snýr seg um at skilja ósemjuna um, hvønn leiklut átrúnaður skal hava í almenna og politiska rúminum í Føroyum, og henda bókin er so ein roynd at skapa eitt betri og meiri kvalifiserað kjak um hesa ósemjuna.**

**Hetta siga Páll Holm Johannesen og Heini í Skorini, ið saman við 13 øðrum hvøssum pennum hava kagað niður í dýpið, har dysturin um føroysku virðini fer fram. Úrslitið er bókin »Krossvegir«**



Sosialurin

## Kjakbók



**Theodor E. D. Olsen**
theodor@sosialurin.fo

*Finst nakað týdningarmiklari orðaskifti, enn kjakið um, hvørjar meginreglur okkara politiska skipan skal byggja á?*

Við hesum spurninginum í huga hava teir báðir ungu havnarmenninir, Páll Holm Johannesen og Heini í Skorini, stjórnað nýggjari bók, sum kemur út í næstu viku.

Spurningurin um, hvønn leiklut átrúnaður skal hava í almenna og politiska rúminum í Føroyum, hevur seinastu árini rættiliga upptikið føroyingar.

Ikki minst tá eldur kom í tær politisku Føroyar orsakað av stríðnum um støðu teirra samkyndu í revsilógini. Í fleiri mánaðir kjakaðust føroyingar við lív og sál um fólkaræði og mannarættindi.

Um kristindóm, virðisgrundarlag, glíðibreytir, tolsemi, víðskygni, trongskygni og rættartrygd. Sum heild um átrúnað í politiskum høpi – og øvugt um politikk í átrúnaðarligum høpi, greiða Heini og Páll frá í fororðinum í bókini.

### Inn í 21. øld

Í góðum vertskapi eitt vetrarkvøld fyrr í ár á einum kamari á Oyrasundskollegiinum í Keypmannahavn fóru Páll og Heini at tosa um hesi viðurskifti. Teir vóru báðir samdir um, at ein djúptøkin bók um, hvagar føroyingar fara í 21. øld, vantaði.

Eftir at húsafasadurnar aftur vóru vaknaðar á Oyrasundi, fóru teir til verka og fingu aðrar skribentar frá ymiskum sjónarhornum og sjónarmiðum at hugleiða um átrúnað, politikk og samfelagsligar avleiðingar. Frá fjølmiðlum til javnstøðu til kjakmentan til fólkakirkjuna til fríkirkjur til gudloysi.

Alt ískoyti í tann mentanardystin, sum fer fram í Føroyum. Heitið á bókini »Krossvegir« kom frá einum vinmanni, og tvítýdningurin kann bæði sipa til krossin og vegamótini, har avgerðir skulu takast, og fólk hittast.

Sprotin við Jonhardi Mikkelsen var fúsur at geva út, og teir hava fingið fríar teymar at ritstjórna bókina.

### Skúlarnir sakna samtíðina

– Ein høvuðsmotivatión til bókina er, at vit sakna hetta slagið av bókum. Tað eru mest siðsøguligar bøkur, sum koma út í Føroyum. Alt gott um bøkur um skiparar, men hvussu nógvar debattbøkur koma út um Føroyar og okkara samtíð?

- Vit vóna eisini, at bókin fer at verða brúkt í undirvísingini í skúlunum. Tað er ein øgiligur mangul upp á tilfar um samtíðina, og tilfar sum viðger nútíðina. Og tað er frustrerandi, staðfestir Páll.

Heini og Páll, sum báðir lesa stjórnmálafrøði, hava báðir roynt seg sum tíðindamenn á m.a. Sosialinum. Umframt at hava skrivað journalistiskar greinir um átrúnað, hava teir eisini skrivað uppgávur um religión og politiskar flokkar, sum kalla seg kristiligar.

- Uttanlands er vanligt, at so skjótt okkurt fyribrigdi stingur seg upp, til dømis muhammedkreppan ella 11. september, so koma debattbøkur beinanvegin fram, m.a. fyri at royna at skilja evnið betur, greiðir Páll frá.

- Kanska ber til at siga, at §266b var okkara muhammedkreppa.

- Hendan bókin snýr seg ikki um §266b, men um viðurskiftini millum religión og politikk. Men §266b var kanska startskotið, sigur Heini.

- Eingir fjølmiðlar komu í dýpdina, hvat veruliga lá aftan fyri §266b. Hetta er ein roynd at fáa eina meira kvalifiseraða debatt, heldur Heini.

Hann nevnir í sama viðbragdi, at ofta er trupult hjá tíðindardaktiónunum at fara aftur um eitt slíkt mál, av tí at umstøðurnar snøgt sagt ikki eru til tað.

- Høvuðsynski við bókini er umframt at skapa eitt betri kjak,